Keypssamtøkan í Vágum

FK í Vágum sóknast eftir

**Fólki**

at starvast í handlinum

Arbeiðstíðin verður 30 tímar um vikuna

Løn:
Sambært sáttmálan við S & K

Nærri fæst at vita við at venda sær til Álv Samuelsen, tel 221130

Skrivlig umsókn skal, skjótast til ber, ella í seinasta lagi 12. februar sendast til

FK Vágar
370 Miðvági
att: Álvur Simonsen
tel 332950

# Shipping Føroyar 2008

**Hvussu kann sjóvinna gerast ein av landsins mest týðandi vinnum? Hendan spurningin fer ráðstevnan Shipping Føroyar 2008 at varpa ljós á. Ráðstevnan verður í Norðurlandahúsinum 7. mars, og við á stevnuni verða m.a. fyrilestrarhaldarar frá Danmarks Rederiforening, Torm A/S, Simon Møkster Shipping, Mærsk Supply Service og Sjóvinnudeplinum**



*Møguleikarnir innan føroyska sjóvinnu skulu troytast meira og betur, siga fyriskiparanir av ráðstevnuni, sum verður í Norðurlandahúsinum í mars mánaði*

RÁÐSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Føroya Banki, Reiðarafelagið fyri Farmaskip og Sjóvinnudepilin skipa fyri Shipping Føroyar 2008. Endamálið við ráðstevuni er at umrøða, hvussu møguleikarnir í føroyskari sjóvinnu kunnu troytast uppaftur betur enn í dag.

Um føroysk sjóvinna var lutfalsliga líka stór sum tann danska, stóð hon fyri eini samfelagsligari inntjening á umleið tvær milliardir krónur. Men tað ger hon ikki. Inntjeningin í føroyskari sjóvinnu verður í løtuni mett at vera um 400 mió. kr.

Greitt er kortini, at føroyingar hava stórar førleikar innan shipping. Millum 800 og 1000 føroyingar sigla við útlendskum reiðaríum, serliga donskum, norskum og skotskum reiðaríum, og spurningurin er, um hendan væl skikkaða arbeiðsmegin bara skal arbeiða fyri útlendsk feløg í alla framtíð.

- Vit halda, at føroyska samfelagið kann fáa munandi meira burtur úr sjóvinnuni enn nú. Fingust nógvir av føroyingunum at arbeiða í føroyskari sjóvinnu, og fingu vit gjørt FAS-skipanina betri, kundi verulig ferð fingist á inntjeningina í sjóvinnuni. Eisini hava vit ríka møguleikar at veita tænastur úr Føroysum fyri útlendsk reiðarí, siga fyrireikararnir.

Føroya Banki, Sjóvinnudepulin og Reiðarafelagið fyri Farmaskip vænta nógvar luttakarar á ráðstevuni, bæði sigalndi fólk, íleggjarar, politikarar og onnur áhugað.

J&K




FØRARAR TIL BETONGBILAR

J & K Betong søkir eftir førara til betongpumpubil og betongbil.
Talan er um krevjandi arbeiði og roknast kann við nógvari yvirtíð.
Tann, ið settur verður, kann byrja beinanvegin, men vit eru tilreiðar at bíða eftir rætta persóninum.

Løn sambært avtalu.

Sendið umsóknina til adressuna niðanfyri, stílað til Arngrim Arngrimsson, blandimeistara, í seinasta lagi mikudagin 6. februar.
Spurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast Arngrími á tel. 585025.

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn
tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: betong@jkp.fo |
www.jkp.fo | Blandimeistarin tel 58 50 25
J & K Betong

Lærlingur

KEV leitar eftir góðum lærlingum innan el.

Ert tú opin og erligur, hevur rímiligan kunnleika til teldu og hug at arbeiða innan el, ynskja vit at frætta frá tær.

Fyrimunur er, um tú hevur SIT.

Send okkum eina skrivliga umsókn við avriti av prógvum v.m.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 12. februar 2008.

Hevur tú okkurt at spyrja um, kanst tú ringja til Oddur á telefon 505882.

KEV

Kongshavnar El-Virkið
Gulasteinsvegur 30 · FO-610 Saltangará
t-postur: kev@kev.fo

www.sosialurin.fo

Lesið internet Sosialin !

